**Røða tá hakin verður settur í til útbygging á Kambsdali 7. juni 2023**

Vælkomin á dalin, harra landsstýrismaður við fylgi, Landsverk og allir gestir – og húsfólk. Hjartaliga vælkomin til hesa hátíðarløtuna.

Nú eru vit umsíður komin til, at hakin skal setast í til hesa útbygging av Miðnámi á Kambsdali. Ein tiltrongd útbygging, sum hevur verið í umbúna í fleiri ár, og sum nú loksins verður veruleiki. Vit standa her millum tríggjar bygningar, sum siga søgu skúlans á sín egna hátt: Niðanfyri stendur Handilsskúlabygningurin, ið varð bygdur í góðum tíðum – og tað sæst á arkitekturinum (hann var liðugur um ársskiftið 89/90). Omanfyri og norðanfyri er studentaskúlabygningurin, ið varð bygdur í ringastu kripputíð, liðugur í 1993 – og tað sæst eisini á arkitekturinum. Og sunnanfyri er samanbyggingin, ið varð gjørd, tá Handilsskúlin og Studentaskúlin vóru lagdir saman í <u>ein</u> stovn í 2015. Og nú eru vit so komin til enn eitt byggistig, har hetta túnið millum bygningarnar verður innilokað til felagsøki í niðaru hæddini, meðan serstovur verða í ovaru hæddini. Hetta fer at savna skúlan, at geva honum ein miðdepil – eitt hjarta, kunnu vit kanska siga – haðani alt virksemi gongur út frá.

Nelson Mandela_skal einaferð hava sagt, at “útbúgving er sterkasta vápnið, tú kanst nýta at broyta heimin við”,. Fyri einum hálvum tíma síðan ella so varð ársins fyrsta pisa her á Kambsdali í ár floygd. Tann eitttúsund og níggjunda í røðini, síðani skúlarnir vóru lagdir saman í 2015. Umframt tey nøkur túsund, sum høvdu tikið prógv á báðum skúlunum áðrenn nakað æt Miðnám á Kambsdali.

Hetta sæst aftur bæði í samfelagsviðurskiftunum sum heild og ikki minst í nærumhvørvinum. Vitugir og virkisfúsir borgarar. Og summi teirra hava ivaleyst verið partur av at skapa hesa verkætlanina, so at nú er klárt at fara undir at byggja.

Við teirri útbygging, sum nú fer í gongd, fær skúlin munandi betri umstøður – serliga á náttúruvísindaliga økinum, men eisini felagsøkið, ið er týðandi partur av nutíðar námsfrøðini, verður munandi betri. Vit gleða okkum til úrslitið, ið vit vænta fer at vera skúlanum – og samfelagnum at gagni.

Her er talan um eina bygging mitt inni í einum skúlabygningi, sum skal hava sítt dagliga virksemi samstundis sum bygt verður. Tað er ikki ókompliserað og fer ivaleyst at krevja tolsemi frá báðum pørtum. Men har tað er vilji, finst vegur, verður stundum sagt, og soleiðis man eisini fara at vera í hesum føri.

Skúlans vegna fari eg at takka Barna- og Útbúgvingarmálaráðnum, Landsverk og teimum, sum hava verið við til at skapa verkætlanina – og ikki minst tingfólkum, sum hava játtað pening til verkætlanina, fyri arbeiðið higartil og ynskja byggimeistaranum – Búsetur, sum skal umseta vøkru tekningarnar frá Zeta Arkitektum til ein ítøkiligan bygning – góða eydnu við arbeiðinum. Vit vóna – og vænta okkum – eitt gott samstarv.

Tá byggiarbeiðið er liðugt um góð tvey ár, fara starvsfólk skúlans og næmingar at hava munandi betri umstøður framhaldandi at broyta heimin við góðari útbúgving.

Takk fyri, øll somul – og góða eydnu við arbeiðinum.

Óli Wolles, settur rektari